## Ættleiðingarfelag heldur familjudag

Leygardagin 12. apríl 2008 verður árligi familjudagurin og aðalfundurin hjá Ættleiðingarfelagnum hildin í HB-húsinum í Gundadali í Havn. Ætlanin við einum familjudegi er fyrst og fremst at ættleiðingarfamiljur koma saman til hugna, spæl og prát, men í ár er eisini ætlanin at fáa onkran gest at koma at heilsa upp á luttakararnar. Hetta er fimta árið á rað, at skipað verður fyri tiltakinum, og áhugin hevur verið vaksandi øll árini. Familjudagurin hjá Ættleiðingarfelagnum er fyri øll, sum hava tilknýti til ættleiðing. Børn, ung, mammur, pápar, ommur, abbar, vinir, kenningar og øll onnur sum hava hug eru hjartaliga vælkomin til sera hugnaliga tiltakið. Fyri nærri kunning um klokkutíðir og luttøkukostnað sí heimasíðuna hjá Ættleiðingarfelagnum www.aettleiding.fo



# Væl nøgdir við áhugan

**Klokkan tíggju í morgun vórðu tilboðini upp á koyringina hjá Bygdaleiðum latin upp á Hotel Føroyum. 16 tilboð eru komin inn, og tað er Jákup Danielsen, stjóri, væl nøgdur við**




*Leið 100 til flogvøllin og leið 400 til Klaksvíkar høvdu størsta áhugan millum tilboðsgevararnar*

TILBOÐ

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

16 persónar og fyritøkur bjóða seg fram til at røkja busssambandið fyri Bygdaleiðir. Talan er um fimm ára sáttmálar við møguleika fyri leingjan í tvey ár.

- Eg eri væl nøgdur við stóru undirtøkuna, hon vísir stóra áhugan fyri koyringini, sigur Jákup Danielsen, stjóri á Strandferðsluni.

Landið er býtt upp í átta økir. Í tveimum av økjunum var áhugin ikki so stórur, bara eitt tilboð kom í hvørjum av hesum økjum. Talan er um Sandoynna og Strendur, sum er leið 440. Á hinum seks økjunum var áhugin størri og millum tvey og fimm tilboð komu inn á hesum økjum.

Størsti áhugin var fyri koyringini vestur á flogvøllin, leið 100, og til Klaksvíkar, leið 400.

Tað kostaði 36 milliónir krónur at reka Bygdaleiðir í fjør, og Jákup Danielsen sigur, at alt bendir á, at talan verður um nakað sama kostnað í ár, einar 35-36 milliónir krónur.

Spurdur, um Bygdaleiðir pr. definitión taka av lægsta tilboði, sigur Jákup Danielsen:

- Nei, tað eru útgreinaðar treytir í útbjóðingartilfarinum, eitt nú um tænastustøði og annað. Vit fara nú at hyggja nærri at innkomnu tilboðunum, áðrenn støða verður tikin um, hvør fær koyringina í ymsu økjunum.

### Klárir 1. mai

Strandferðslustjórin sigur, at enn er alt so feskt, og at hann higartil bert hevur sæð tølini í tilboðunum.

Í teimum báðum økjunum, har bert hitt eina tilboðið er komið inn, er væl ikki so nógv at rafla um, men seks av økjunum hava fleiri tilboð at velja ímillum.

- Vit fara longu nú seinnapartin at kanna tilboðini nærri, og síðani verða samráðingar tiknar upp við vælsaktans lægstu tilboðini. So um tvær til tríggjar vikur skuldi alt helst verið komið upp á pláss, sigur Jákup Danielsen.

Hetta merkir, at um hálvan apríl skuldu tilboðsgevararnir gjarna vita, um teir hava fingið koyringina ella ikki.

- Nýggju sáttmálarnir koma í gildi 1. mai, og vit rokna við at verða klárir til ta tíð, sigur Jákup Danielsen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins.

# Heini Weihe vann Shark Atlantic

**Nú er kappingin Shark Atlantic liðug. Tað hevur viðrað illa til hemarafiskiskap í januar og februarmánaði, siga fyrireikararnir**

Heini Weihe vann kappingina við einum hemara, ið vigaði 196 kg. Og fyri hendan fiskin vann hann eitt tíggjutúrakort við Atlantic Airways.

Nr 2 gjørdist Jóannes Gaard við einum hemara, ið vigaði 160 kg. Og fyri hendan fiskin vann hann ein Bjargingarbát frá Fønix.

Nr 3 varð Johan Simonsen við einum hemara, ið vigaði 117 kg. Og fyri hendan fiskin vann hann eitt gávubræv frá Jógvan Weihe

Kappingin gekk væl at byrja við. Tey fyrstu seks vikuskiftini vóru hendingarrík, har teir flestu luttakarnir upplivdu at berjast við hemara í tráðuni. Men sum vant vóru nógvir mistir.

- Annars hevur veðrið í januar og februar verið ógvuliga vánaligt, so tað hava verið fáir leygardagar, ið hava viðrað - og í heilatikið fáir fiskidagar í seinnu helvt av kappingini. Havi sjálvur verið nakrar túrar, men ongan fingið. Tó mistu vit tveir tann eina dagin, sigur Magni Blástein frá Fiskiferðum.

Tað var Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, ið handaði høvuðsvinningin , tíggjutúrakortið á rutunetinum hjá AA. Og Umboð fyri ávíkavist Fønix og Jógvan Weihe handaðu annan og triðja vinning, og var tað leygardagin.



*Vinnarin Heini Weihe við stóra hemaranum*